# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# KOM SO VIÐ FÓLKAATKVØÐUNI

Stjórnarmálið hevur fylt nógv í føroyskum politikki, longu langt áðrenn vit fingu floksbýti á tingi millum sjálvstýri og samband í 1906. Tey nógvu árini eftir floksbýtið, var stjórnarmálið tað, sum var munurin millum flokkarnar.

Í 1928 blandaði sosialdemokratiski Javnaðarflokkurin seg uppí, kom á ting við eini sosialdemokratiskari hugsjón, sum ikki hevði stjórnarmálið sum høvuðsmál. Í 1936 kom Vinnuflokkurin, kanska sum eitt mótspæl til arbeiðararørsluna, sum kom á ting gjøgnum Javnaðarflokkin. Vinnuflokkurin bleiv til Fólkaflokkin, tá fólk úr Gamla Sjálvstýrinum kastaðu saman við Vinnuflokkinum um Fólkaflokkin.

Støðuna undir krígnum kenna vit, tá Fólkaflokkurin var ein tingmann frá meirilutanum. Ein av tingmonnunum hjá Javnaðarflokkinum hevði betur hug á Fólkaflokkinum, og tað endaði alt við fólkaatkvøðuni um loysing ella samband 14. september í 1946.

Tað sló Zakariasi Wang fyri bróstið, at vit á hesum stað mikudagin skrivaðu, at fólkaatkvøðan var »demokratisk ivasom«. Tá vit skrivaðu so, er tað tí, at vit halda ikki, at tilgongdin ella viðgerðin ella fólksliga luttøkan kring fólkaatkvøðuna var nóg rímulig. Men tað er nú ikki so nógv tað, sum vit hava áhuga í at viðgera. Tað er so mangur, sum hevur vrakað hasa fólkaatkvøðuna, so tað nýtist okkum í dag ikki at kjakast um.

Men vit halda so avgjørt ikki, at hendan fólkaatkvøðan kann brúkast sum grundarlag fyri fólksins støðu í dag. Tað er ikki rætt at grunda fólksins støðu á eina út við sjeyti ára gamla fólkaatkvøðu, sum varð vrakað, og hvørs týdningur annars er fánaður, tí allir flokkar í praksis hava góðtikið ta heimastýrislóg, sum nakrir flokkar samtyktu í kjalarvørrinum á fólkaatkvøðuni.

Men sjálvandi er tað fólkið í Føroyum, sum skal taka avgerð um okkara framtíð – eisini um okkara framtíð í danska ríkinum. Tí er tað spell, at arbeiðið í stjórnarskipannarnevndini eftir øllum at døma er farið fyri bakka. Tað allar besta var, at allir flokkar á tingi kundu komið til eina felags støðu. Men tað ber helst ikki til, og tí minnir støðan í so máta eitt sindur um støðuna í 1946, at vit ikki ein gong kunnu semjast um, hvussu tilgongdin skal vera til avgerðina, sum annaðhvørt loysir okkum frá ríkinum ella sigur, at vit góðtaka at vera partur av ríkinum og harvið eisini av donsku grundlógini.

Men tað er ikki neyðugt at gera tað so innviklað. Tá tingfólk ikki megna at finna eina semju – nú tey hava roynt tað besta tey kunna í 13 ár, lat okkum so fáa hasa fólkaatkvøðuna, so politikararnir kunnu fara til arbeiðis – innan ella uttan fyri ríkisfelagsskapin!

**» Sjálvandi skal fólkið í Føroyum gera av framtíðina**

## Tá Zakarias Wang skapti ein sambandsløgmann





Í sendingini »Meg minnist«, hevur Jógvan Arge seinastu vikurnar tosað við Paula Ellefsen, fyrrverandi løgtings-, fólkatings- og løgmann. Onkur vil siga, at Pauli Ellefsen á mangan hátt var ein íspegil – í øllum førum, at honum dámdi væl at arga.

Men hvussu er og ikki, so greiddi hann frá, hvussu hann kom upp í praktiskan sambandspolitikk í sínum ungum árum:

*»Tað var á VBV (studentaskúlin, red). Har var ein serdeilis ivrigur sambandsmaður, sum æt Zacharias Wang. Hann spurdi meg, um vit báðir ikki skuldu taka ein politiskan fund saman við øðrum. Eg hevði ongantíð upptraðkað fyrr, so eg vildi, at vit fyrireikaðu okkum væl. Vit fóru oman til Georg L. Samuelsen, hann gav okkum krút. Vit hirdu á, og eg trúgvi ikki, at Sambandsflokkurin nakrantíð hevur fingið so stórt stemmulutfall, sum tað kvøldið…«*

Soleiðis segði Pauli Ellefsen. Vit kunnu bara staðfesta orðini hjá Jens Otto Krag, at »man har et standpunkt, til man ta'r et nyt«.

## Gjalda fyri Lýsingartorgið

Í næstu viku fer Sosialurin at broyta Lýsingartorgið, sum hevur verið í blaðnum í næstan 20 ár. Ein av broytingunum verður, at nú skal gjaldast fyri lýsingarnar, og at tær skulu sendast blaðnum umvegis internetið.

Higartil hevur tað verið ókeypis at seta lýsingar í, sum ikki eru handilsligar, ella har virðið á selda lutinum hevur verið undir eitt vist.

Hetta verður nú alt broytt, so treytirnar verða einfaldari. Fólk skulu nú sjálvi skrivað lýsingarnar inn gjøgnum internetið, og gjaldast skal eisini við gjaldskorti umvegis internetið.

Kostnaðurin fyri allar lýsingarnar verður framyvir 50 krónur hvørja ferð.



**» Arabiskir tilstandir á tingi**

BJARNI DJURHOLM
KJAK Á SÍÐU 24



**» Løgmaður lagdur á ís**

KÁRI Á RÓGVI
KJAK Á SÍÐU 25

## Zacharias Heinesen sjeytifimm



Á framsýning, sum letur upp í Steinprenti á 75 ára føðingardegnum hjá Zacharias Heinesen hósdagin 19. mai, sýnir hann fram eitt úrval av vatnlitamyndum, sum hann hevur málað seinastu fimtan árini.

Vatnlitamáling hevur Zacharias altíð fingist við til skitsubrúk, men hann er seinnu árini farin at dyrka hesa listagreinina í alsamt størri mun sum eina sjálvstøðuga listagrein, sum hann hevur fingið størstu viðurkenning fyri bæði í Føroyum og uttanlands. Tað eru sum kunnugt hansara vatnlitamyndir, ið prýða okkara pengaseðlar og eisini eru hansara vatnlitamyndir umboðaðar í høgt virda pappírslistasavninum hjá Statens Museum for Kunst (Kobberstiksamlingen).

Samanborið við oljumáling eru vatnlitir betri egnaðir til spontanar, lættar og ljósar myndir og eftir myndunum á hesi framsýningini at døma, eru vatnlitir eisini sum skaptir til listarligu ætlanir Zachariasar, tá hann við fáum ella mongum strokum fangar eitt fúlt æl í Havn, várligt sirm á Velbastað ella glitrandi ljósbrigdi í Mikinesi. Ofta eru spektralitirnir umboðaðir í myndunum, har skyggjandi gulir og reyðir litblettir festa í grønt, violett og blátt. Føroyska landslagið, vátt í vátt við leskiligastu litum – tað ljóðar næstan sum kundi tað verið ov nógv av tí góða, men so er ikki. Hetta er Zacharias Heinesen, ein ektaður listamaður, ið sýnir fram sínar sevjumiklu, neyvu vatnlitamyndir, sum brima av listarligum yvirskoti.

Øll eru vælkomin til upplatingina klokkan 16-18 hósdagin 19.mai í Steinprenti á Skálatrøð. Framsýningin er stuðlað av Okkara og verður at síggja í Steinprenti hetta til 2. juli.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*